# Fíggjarleiðari til Strandfaraskip Landsins

**Kanst tú stýra búskapinum? Dámar tær at luttaka í strategiskum menningarætlanum? Og ert tú ein góður leiðari?**



Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum dugnaligum og dámligum fíggjarleiðara at byrja skjótast gjørligt, nú okkara fíggjarleiðari hevur tikið við nýggjum avbjóðingum í føroyska vinnulívinum.

**Starvið**
Fíggjarleiðarin hevur ábyrgdina av og skipar fyri fíggjarstýringini og roknskaparhaldinum á Strandfaraskipum Landsins. Fíggjarleiðarin er partur av leiðslubólkinum og luttekur í strategisku menningini av fyritøkuni. Fíggjarleiðarin vísir beinleiðis til stjóran.

**Umsøkjarin**
Tú hevur útbúgving og royndir innan fyri fíggjarstýring og/ella roknskap. Royndir við fíggjarstýringsskipanini hjá Navision og kunningartøkni annars eru ein fyrimunur. Vit vænta, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni, og royndir í prosjektleiðslu eru ein fyrimunur. Tú arbeiðir analytiskt og málrættað, og tú megnar at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Leiðarin hevur stóra ávirkan á egin viðurskifti og menningina av Strandfaraskipum Landsins.

Starvið er lønt í 36. lønarflokki hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannsstarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Kristian Davidsen, stjóra, ella Johnni M. Poulsen, fíggjarleiðara, á telefon 34 30 00.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Skrivligar umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 21. apríl og skulu sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att.: Páll Heinesen
Yviri við Strond 4
Postboks 88
FO 110 Tórshavn
ella teldupost: pah@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýggjan av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo



Á Økisdeildini í Suðuroy starvast 4 fólk.

Tú verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingarnar í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

ENDURLÝSING:

# Sosialráðgevi til Suðuroyar deild

Á deildini hjá Almannastovuni á Tvøroyri er eitt fulltíðarstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja.

Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni, og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávunar í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar stovnurin hevur.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um ráðgeving og vegleiðing av borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar, íverksetan av fyriskipanum, gerð av tilráðingum í sambandi við umsóknir um fyritíðarpensjónir og annað.

Vit sóknast eftir fólki við sosialráðgevaraútbúgving. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan almenna fyrisiting, góðan telduførleika á brúkarastøði, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6. Starvsøkið er Suðuroyar deild, og fevnir annars um øll øki hjá Almannastovuni.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til John Mortensen, deildarleiðara, tel. 353560.

**Umsóknarfreist**
Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 22. apríl 2006.

Send umsóknina til
Almannastovuna,
Smyrilsvegur 20,
Postboks 3096,
110 Tórshavn.

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80